# At velja tilætlað

Avtala eitt tíðarskeið, hálvan dag ella ein heilan dag.

Ber teg at, sum tú plagar, men fylg serliga væl við teimum valum tú gert, stórum og smáum.

Um tú fert upp við tað sama, klokkan ringir, fert í bað ella ikki, hvat tú etur á morgni, um tú fert til gongu ella ikki, hvat tú nýtir pening til, um tú fert saman við vinum o.s.fr.

Ven teg at steðga á, áðrenn tú velur og hugsa:
*Velji eg við hjartanum, ella velji eg við heilanum.*

1. Skriva trý val, sum tú serliga gav tær far um

2. Skriva tvey val, tú gjørdi uttan at hugsa stórvegis

3. Skriva eitt val, tú kundi hugsað tær at sloppið undan